# Seinasta stemman í



*Valstaðið í Saksun er heima í køkinum hjá formanninum í valstýrinum, Målfryd Dahl-Olsen. Kalvin liggur á pannuni og eplini standa útá. Hetta ávirkar kortini ikki proseduruna við valið, sum verður hildið eftir øllum reglum og kunngerðum*
*Mynd: Snorri Brend*

**Gongst sum ætlað verður ikki val hildið aftur í Saksun. Seinasti veljarin, sum greiddi atkvøðu í gjárkvøldið, skrivaði tí í roynd og veru valsøgu!**

FÓLKATINGSVAL

*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Saksun:** Tað er lætt hjá einum fremmandum at finna valstaðið í Saksun.

Úr Hvalvík vórðu boðini einføld: - Koyr bara inn í bygdina. Snara síðani til vinstru við Svartá og koyr framvið teimum fyrstu fjósunum. Tá koma eini hvít hús undan, og tað er valstaðið!

Sum sagt, so gjørt. Ongar valplakatir eru at síggja ella at meta seg eftir og einki skelti vísir á valstaðið. Fólkatalið er einans 28, og tey munnu vita, hvar valstaðið er. Á vegaskeltinum stendur Hvalvíksvegur nummar 3.

Valið í bygdini fer fram hjá tí til eina og hvørja tíð sitandi formanni í valstýrinum. Og hesaferð var valstaðið tí heima hjá Målfryd Dahl-Olsen.

Higar kundu tey 20 fólkini fara, sum høvdu valrætt. Her var alt gjørt uppá einfaldasta hátt, men kortini soleiðis sum vallógin fyriskipar.

Eisini í Saksun skal vallógin haldast til punkt og prikke!

## Trý í stýrinum

Klokkan er farin at nærkast fimm henda vakra valdagin. Tað hevur higartil verið rættiliga friðarligt á valstaðnum í Saksun.

Hetta er eitt av teimum heldur óvanligu valstøðunum. Her er lítið gjørt burtur úr við borðum til valstýrið, básar at greiða atkvøðu í og kassanum, har atkvøðuseðilin skal leggjast í. Valstaðið er heima hjá Målfryd – í roynd og veru í køkinum og stovuni í heimi hennara. Soleiðis hevur tey seinastu valini. Tað er ein hugnaligur dámur í einum av hesum minstu valstøðunum kring landið.

Tey trý í valstýrinum eru øll upptikin við sítt.



*Ein kvinna fær atkvøðuseðilin handaðan. Hetta er kanska seinastu ferð at saksuningar sleppa á val í heimbygdini. Næstu ferð skulu tey helst til Hvalvíkar at velja*
*Mynd: Snorri Brend*

## Ikki so vemodigt at missa valstaðið

**Tað hevur leingi ligið í luftini at valstøð verða niðurløgd. Hetta er longu hent í rímiliga stórum valstøðum, og nú er túrurin helst komin til Saksun við sínum 20 veljarum.**

**Fyri formannin í valstýrinum í Saksun, Målfryd Dahl-Olsen kann saktans henda, at valið í gjár er tað seinasta í heimbygdini: Óhugsandi er ikki, at saksuningar næstu ferð mugu á val í Hvalvík.**

**- Nei, hetta er ikki so vemodigt fyri meg. Tað er í fínasta lagi, sigur hon við Sosialin.**

**Sannleikin er hann, at fólk í Saksun eru mobil. Elsti maðurin hevur í bygdini bil, og kann tí koyra á nýggja valstaðið.**

**- Hinvegin er tað eisini ein sannroynd, at fólk mugu allíkavæl koyra framvið Hvalvík, tá tey koma higar frá arbeiði.**

**- So at skula velja í Hvalvík, ger neyvan tann stóra munin, slær Målfryd fast.**

**Ósvaraði spurningurin í løtuni er, hvar saksuningar skulu velja nýggja løgtingið í januar mánaði.**